# Vestmenningar halda kósina

**Eftir tvey umfør er líkt til at bert klaksvíkingar kunnu hótta vestmenningar. Havnarmenn skuffaðu enn einaferð**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Eins og í fjør hava føroyameistarnir seinastu tvey úr Havnini lagt sera varliga út. Tá komu teir sterkt aftur eftirsum hini toppliðini lógu stutt framanfyri í fyrru helvt. Í ár tykist støðan heldur broytt, tí vestmenningar strúka einsamallir saman við klaksvíkingar avstað ímóti FM-tindinum.

Havnarmenn leiktu óvæntað bert ein 2-2 javnleik ímóti veikasta liðnum í fremstu deildini tá rating viðvíkur, nevnliga kollfirðingum. Unglingarnir Eyðálvur Johannesen og Martin Poulsen hittust á fyrsta borði, og sjálvt um Eyðálvur (1640 rating) hevur havt tvey sabbat ár frá talvi, eydnaðist honum at vinna á Martini. Eitt flott úrslit hjá kollfirðinginum.

Olaf Berg vann sum væntað á Karl L. Johannesen eins og Herluf Hansen vann á Alvin Joensen. Á fjórða borði vann tann ungi Árant Djurhuus sensatiónelt á Andrias Ziska, sum hevur havt eina óhepna kappingarbyrjan á fjórða borði.

Ætla havnarmenn at stríðast um fyrsta plássið aftur í ár, er als ikki ráð at missa tílík stig sum teir gjørdu í vikukiftinum í Kollafirði.

Í næstu viku frætta vit nærri frá kollfirðinginum Hans Kristian Simonsen, sum júst nú er í Spania til HM fyri ungdómar.

## Halda fast um endan

Helst ætlaðu klaksvíkingar at fáa fult hús ímóti HT 2 - næstbesta havnarliðið í 1. deild - í vikuskiftinum. Tað varð um reppið at málið eydnaðist, men Jógvan Næs úr Havn forðaði fyri hesum á fjórða borði. Hann vann eitt drúgvt talv á Peturi Hans Poulsen. Hesin seinni kom í øgiliga tíðarneyð og varð tað orsøkin at hann mátti leggja kongin.

Á fyrsta borði varð tað hinvegin havnarmaðurin Jóhan Gaard sum kom í svára tíðarneyð, og hetta útnyttaði Ólavur Simonsen til fulnar. Ólavur fór til Íslands í gjár, har hann í døgunum 23. okt — 02. nov. luttekur í sera sterkari opnari kapping í Reykjavík.

Rani Nolsøe vann sítt fyrsta talv á Finnbjørn Zachariassen í seinastu viku og í Klaksvík sat Johan E. Hansen yvir av honum. Johan hevur væl lægri styrkistal, men hóast hetta fekk hann hampiliga støðu í miðspælinum. Rani lat tó ikki havnarmannin koma framat, og tá Johan seinni offraði skeivt var Rani skjótur og vann sítt annað talv í ár.

Tummas M. Anthoniussen hevur eisini fult stigatal eftir hann vann á Poul Poulsen. Talvið var javnt og vardi leingi har klaksvíkingurin Tummas Martin loksins dróg longra stráðið tá hann í tíðarneyðini vann materiali.

Ein tryggur 3-1 sigur til klaksvíkingar, sum sjálvandi vónaðu at hvalvíkingar fóru at basa vestmenningum. So skuldi ikki verða.

## Vælnøgdir vestmenningar

Við tí í huganum at KTF hittu HT 2 máttu vestmenningar helst vinna sín dyst ímóti hvalvíkingum. Vestmenningar stríddust eisini sum úlvar í skóg og vunnu - eins klaksvíkingar — 3-1. Eyðkenni hjá vestmenningum hevur altíð verið at stríðast til síðsta leik, og júst hetta gav teimum sigurin.

IM John Rødgaard vann eitt langt talv á Martin Brekká á fyrsta borði við svarta fólkinum. Tað var annars eitt javnt talv, men í tíðarneyðini hjá John misti Martin finnu, og tá tíðarneyðin var av, vann John eitt gott endatalv, sum als ikki var lættliga vunnið.

Torbjørn Thomsen telvaði væl ímóti Finnbjørn Zachariassen. Eisini kom hann í tíðarneyð, men spældi hóast hetta sínir møguleikar til fulnar og vann loksins eitt drúgvt talv.

Á triðja borði varð talvið millum John Jacobsen og Sámal Christiansen javnt allatíðina og teir samdust tí um javnleik. Á fjórða borði vardi Gunnar Joensen úr Hvalvík væl svørtu borgina ímóti Jón Mikkelsen, og samdust teir eisini um javnleik.

Í Vestmanna er lagið gott og vónirnar sera góðar. Teir hitta HT 2 næsta umfar, sum verður leikt 4. november, meðan KTF skal til Havnar ímóti meistaraliðnum.

**Støðan:**

| | |
|---|---|
| VT | 7 stig |
| KTF | 6 |
| HT | 4,5 |
| HT2 | 2,5 |
| KT | 2 |
| TFS | 2 |

04. nov hittast:
HT 2 - VT
TFS - KT
HT - KTF

## 2. deild

Runavíkingar vunnu heili 4-0 á klaksvíkingum í vikuskiftinum og tá sandavágsmenn bert megnaðu ein 2,5-1,5 sigur á vestmenningum, liggja hesi bæði lið jøvn á odda í aðru deild. Hjá vestmenningum fekk Kári Durhuus ein flottam javnleik ímóti Torkil Nielsen.

Toftamenn liggja bert eitt stig aftanfyri runavíkingum og vestmenningum, eftir teirra 3,5-0,5 sigur á gøtumonnum. Jens Kristian Hansen var aftur at síggja á toftaliðnum og vann hann eisini sítt talv á John Joensen. Kappingin um fyrsta pláss og atgongd til fyrstu deild kemur uttan iva at standa ímillum toftamenn, sandavágsmenn og runavíkingar.

Í 3. deild vóru bara tveir dystir leiktir. HT4 - KT2 varð útsettur. Í Vestmanna vann liðið úr Oyrarbakka tepurt á vestmenningum, meðan oddaliðið úr Havnini, HT3, og sandavágsmenn óvæntað leiktu 2-2.

## FM í útisetu

Ikki bert heima á klettunum liggja klaksvíkingar væl fyri, men sanniliga eisini í kappingini at finna útisetaføroyameistaran í føroyska talvfelagnum í Keypmannahavn. Heini Olsen og Finnbjørn Vang hava báðir fult stigartal, trý av trimum. Terji Petersen hevur tvey stig meðan Carl Eli N. Samuelsen, Pól Martin Hansen og Regin Reinert hava eitt stig. Ian Leyni og Dannie Nielsen hava einki stig, men hava teir eitt útsett talv liggjandi.

Sjey umfør skulu telvast.

## Øgiligur endaspurtur

Í seinastu talvgrein lósu vit um ringu byrjanina hjá Flóvin Tór Næs í Hoogeeven kappingini í Hollandi. Flóvin hevði tá einki stig av trimum møguligum. Hann vann síðani tvey tey næstu talvini. Tá hann í sætta umfari aftur tapti, var tað neyvan nakar sum væntaði at Flóvin fór at bjarga kappingini. Bert trý umfør restaðu í.

Í sjeynda umfarinum vann hann á einum 2163 mótstøðumanni og tá hann í nógv verri støðu vann á einum altjóða meistara í áttanda umfarinum, kundi hann við at vinna seinasta talvið — eisini altjóða meistari - bjarga kappingini somikið at hann eisini fekk nøkur ratingstig við heimaftur í lumman. Bert sekstan leikir hevði Flóvin flutt í seinasta talvinum tá russiski altjóða meistarin legði kongin. Flóvin offraði djarvt í hesum talvi, og tá mótstøðumaðurin ikki leikti røttu leikirnar vann Flóvin lættliga. Um tað er føroyskt met hjá Flóvini, at bert nýta sekstan leikir at vinna á altjóða meistara, er ringt at siga, men vælhugsandi. Talvið er við í blaðnum í dag.

Fimm stig ognaði Flóvin sær, meðan vinnarin GM Mikhail Gurevich fekk sjey stig.

## Talvið hesa vikuna

**Bert sekstan leikir — møguliga føroyskt met — og mótstøðumaður Flóvins legði kongin.**

**IM Mikhail Archangelsky - Flóvin Tór Næs**
**Essent Open Hoogeveen (9), 20.10.2001**

1.e4 e5 2.Bc4 Rif6 3.d3 c6 4.Bb3 a5 5.a3 a4 6.Ba2 d5 7.Rif3 Bg4 8.h3 Bh5 9.exd5 Bc5 (Aktivt spæl frá Flóvin) 10.0-0 cxd5 11.g4 Rixg4 (Besti kjansur, sjálvt um offrið er ivasamt. Bg6 12.Rixe5 og helst tapta støðu) 12.hxg4 Bxg4 13.Fe1?? (avgerandi feilur. 13.Ric3 ella Re1 hevði givið áhugavert talv. Flóvin hevur tá møguliga Ra6 við álopspæli, men hvítur hevur tó kanska bestu møguleikar) Bxf3 14.Fxe5+ Kf8 15.Ff5 Ra6! (nú er talvið avgjørt) 16.Bg5 (16.Fxf3 missur frúgv eftir Rg6+) Rg6!



0-1

# Liðkappingin 2001/2002 - 2. umfar

**1. Deild**

| | | |
|---|---|---|
| KTF | HT 2 | 3-1 |
| Ólavur Simonsen (2235) | Jóhan Gaard (1835) | 1-0 |
| Rani Nolsøe (2185) | Jóhan E. Hansen (1730) | 1-0 |
| Tummas M. Antoniussen (1965) | Poul Poulsen (1720) | 1-0 |
| Petur H. Poulsen (1795) | Jógvan Næs (1715) | 0-1 |
| VT | TFS | 3-1 |
| IM John Rødgaard (2315) | Martin Brekká (2070) | 1-0 |
| Torbjørn Thomsen (2210) | Finnbjørn Zachariasen (2050) | 1-0 |
| John Jacobsen (1910) | Sámal Christiansen (1850) | 0,5-0,5 |
| Jón Mikkelsen (1655) | Gunnar Joensen (1790) | 0,5-0,5 |
| KT | HT | 2-2 |
| Eyðálvur Johannesen (1640) | Martin Poulsen (2085) | 1-0 |
| Karl L. Johansen (1680) | Olaf Berg (2040) | 0-1 |
| Alvin Joensen (1640) | Herluf Hansen (2035) | 0-1 |
| Árant Djurhuus (1175) | Andrias Ziska (1955) | 1-0 |

**Støðan eftir 2. umfar**

| | | |
|---|---|---|
| 1. VT, Vestmanna | 2-0-0 | 07,0 |
| 2. KTF, Klaksvík | 2-0-0 | 06,0 |
| 3. HT, Tórshavn | 1-1-0 | 04,5 |
| 4. HT 2, Tórshavn | 0-0-2 | 02,5 |
| 5. KT, Kollafjørður | 0-1-1 | 02,0 |
| 6. TFS, Hvalvík | 0-0-2 | 02,0 |

**2. Deild**

| | | |
|---|---|---|
| KTF 2 | RT | 0-4 |
| Óli Joensen (1655) | Bjarki Ziska (1805) | 0-1 |
| Vagn Heldarskarð (1605) | Rúni Jacobsen (1725) | 0-1 |
| Jan Simonsen (1315) | Brandur K. Jacobsen (1665) | 0-1 |
| Ebbe Petersen (1215) | Eyðun Lamhauge (1625) | 0-1 |
| GT | TT | 0,5-3,5 |
| John Joensen (1750) | Jens Kristian Hansen (2165) | 0-1 |
| Jákup F. Joensen (1715) | Helgi Joensen (1740) | 0,5-0,5 |
| Reinhold Isaksen (1710) | Wensil Højgaard (1730) | 0-1 |
| Heri Thomsen (1375) | Justines Hansen (1650) | 0-1 |
| ST | VT 2 | 2,5-1,5 |
| Torkil Nielsen (2080) | Kári Durhuus (1755) | 0,5-0,5 |
| Bernhard Augustinussen (1835) | Jákup á R. Andreasen (1655) | 1-0 |
| Sonni Nielsen (1745) | Jóan Pauli Johannesen (1465) | 0-1 |
| Heri Christoffersen (1600) | Ingolf Debes (1220) | 1-0 |

**Støðan eftir 2. umfar**

| | | |
|---|---|---|
| 1. ST, Sandavágur | 2-0-0 | 06,0 |
| 2. RT, Runavík | 1-1-0 | 06,0 |
| 3. TT, Toftir | 2-0-0 | -15,0 |
| 4. VT 2, Vestmanna | 0-1-1 | 03,5 |
| 5. KTF 2, Klaksvík | 0-0-2 | 01,5 |
| 6. GT, Gøta | 0-0-2 | 01,0 |

**3. Deild**

| | | |
|---|---|---|
| VT 3 | Rókur | 1,5-2,5 |
| Jákup Durhuus (1620) | Ernst M. Hansen | 1-0 |
| Rógvi Hansen (1075) | Petur Sumberg (1635) | 0,5-0,5 |
| Bárður Joensen | Árni M. Dam | 0-1 |
| Fróði Skúvadal | Bergur Johannesen (1355) | 0-1 |
| HT 3 | ST 2 | 2-2 |
| HT 4 | KT 2 | Útsettur |



StÍF-KÍF 30-26 (12-14):

# KÍF dragnaði í seinna hálvleiki

**Kollfirðingar vóru á odda í hálvleikinum, men í seinna hálvleiki tók StÍF sær um reiggj og vann at enda við fýra málum**

HONDBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*

KÍF gav StÍF ein kvøkk, tá liðini hittust á Skála sunnudagin. KÍF legði harðliga fyri og fór fram um 3-0 beinanvegin.

StÍF royndi at stríða seg inn í dystin aftur, og teir javnaðu til 7-7. Men so fór KÍF aftur fram um, og leiðslan helt sær restina av fyrra hálvleiki. Eina løtuna var KÍF á odda við fýra málum, og tá kendi heimaliðið seg noytt til at bróta dystin av fyri at hava time-out.

Teir ráðførdu seg um støðuna, og tá liðini løgdu aftur til brots, kláraði StÍF at taka seg tvey mál inn á KÍF, so støðan í hálvleikinum var 14-12 til KÍF.

Tað vóru serliga Dorica Tomic og Regin Petersen, sum í fyrra hálvleiki gingu undan at gera mál fyri KÍF, og hóast teir á heimaliðnum royndu sítt ítarsta, so vóru teir við undirlutan fyrsta hálva tíman.

## Gongdin vendi

Leiðslan hjá KÍF helt sær fimm minuttir inn í seinna hálvleik. StÍF fekk nøkur tøtt mál, og tá støðan var 18-16 til StÍF, vóru tað gestirnir, sum kendu seg noyddar at halda time-out.

Hóast teir vóru ídnir, tá teir fóru aftur at spæla, so hevði heimaliðið nú sett seg á dystin, og KÍF kláraði ikki at venda gongdini aftur. Kollfirðingar hingu uppi í StÍF, men strandingar øktu spakuliga um leiðsluna.

Sveinur Justinussen var tryggur, tá hann í fimm førum varð settur at skjóta brotskast. Brotskøstini vóru dømd, eftir at kollfirðingar vóru í so ídnir í verjuspælinum, tá strandingar byrjaðu at finna holini og spæla seg til opnar kjansir.

Dysturin endaði við 30-26 til StÍF, og tað vóru teir á heimaliðnum væl nøgdir við. Teir høvdu verið aftan fyri í 35 minuttir, men so vendu teir gongdini og kláraðu at vinna ein fýramáls sigur, tá samanumkom.

KÍF vísti ágrýtni og gott spæl í fyrra hálvleiki, men í seinna hálvleiki kláraðu teir ikki at seta neyðugu forðingarnar fyri StÍF, sum 18 av sínum 30 málum seinna hálva tíman.

**Dysturin í tølum:**
**StÍF-KÍF 30-26 (12-14)**
Málskjúttar:
StÍF: Sveinur Justinussen 8 (5), André Danielsen 6, Costin Domistrescu 5, Artur Johansen 3, Jón Rasmussen 3, Marius Joensen 3, Alexander Johansen 2
KÍF: Durica Tomic 9 (1), Petur Martin Poulsen 4, Regin Petersen 4, Iljan Topic 3, Jákup Dam 2, Petur Martin Johansen 1, Kristian Madsen 1, Vagnur Johannesen 1, Finn Heri Johannesen 1
Brotskøst: StÍF 5, KÍF 1
Útvísingar: StÍF 2, KÍF 3
Dómarar úr Kyndli: Hannis Wardum og Uni Wardum

Stjørnan-Sóljan 34-22 (19-8):

# Simona skjýtur alt niður

**Sunnudagin struku skotini hjá henni 13 ferðir í málið, og í fyrstu trimum dystunum í ár hevur Simona Dzuigyte skorað 40 mál. Stjørnan hevur vunnið sínar fyrstu tríggjar dystir**

HONDBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*

Litaviski stórskjúttin hjá Stjørnuni hevur fingið flúgvandi byrjan í nýggja kappingarárinum. Eftir tríggjar dystir hevur hon 40 ferðir sent leðurkúluna í kassan í fyrstu dystunum í ár, og tað er bara Asta Petrauskiene hjá Sóljuni, sum klárar at fylgja við Stjørnukvinnuni.

Sunnudagin hevði Simona aftur týðandi leiklut, tá fyrrverandi liðfelagarnir hjá henni í Sóljuni vóru á vitjan í Klaksvík. Stjørnan vann við 12 málum, og tað var ikki misvísandi fyri leikgongdina.

Stjørnan hevur fult stigatal eftir fyrstu tríggjar dystirnar í ár, og kvinnurnar úr Klaksvík hava sett Kyndil, Neistan og Sóljuna dyggiliga upp á pláss í teimum fyrstu dystunum.

## Stjørnan streyk avstað

Sóljan legði best fyri í dystinum í Klaksvík sunnudagin, men sum fráleið gjørdist tað púra greitt, at heimaliðið fór at vera omaná.

Sóljan var fyrstu 10 minuttirnar á odda fleiri ferðir, men eftir tað steyk Stjørnan avstað. Sóljan kom ongantíð aftur í nánd av Stjørnuni aftur, og tá dysturin var av, var úrslitið 34-22 til Stjørnuna.

Stjørnuspælið var til tíðir gott. Við hvørt spældu tær nógv upp á tvørs framman fyri vágaverjuna fyri at finna hol, men serliga var kvika kontraspælið lemjandi fyri gestirnar.

Sóljan javnaði til 5-5, tá 9 minuttir vóru spældir, men so skoraðu tær ikki í 10 minuttir. Hesar minuttirnar fekk Stjørnan seks mál, og tað var hesa løtuna, at grundarlag var lagt undir trygga sigurin.

Andrijana Milodanovic var neyv, tá hon í fyrra hálvleiki fekk møguleikar av høgra vongi, og hon skoraði øll síni sjey í fyrra hálva tímanum.

## Stundum statistar

Hjá Sóljuni vóru tað serliga Asta Petrauskiene og vongspælarin Herta Simonsen, sum vóru vandamiklar. Tær skutu mál gjøgnum allan dystin, og samanlagt stóðu tær fyri 14 av teimum 22 málunum hjá Sóljuni.

Við hvørt glógvaði álopsspælið hjá Sóljuni, men tað var bara í løtum, at áskoðararnir fingu varhugan av, at Sóljan kundi tagað Stjørnuverjuna sundur.

Í seinna hálvleiki kláraðu tær stundum at lirka seg ígjøgnum verjuna hjá klaksvíkskvinnum, og tær fingu bara eitt mál minni enn heimaliðið fekk seinna hálva tíman.

Tað var tí serliga seinna hálva av fyrra hálvleiki, sum royndist væl hjá heimaliðnum, og hesa løtuna vóru gestirnir stundum hjálparleysir statistar í kvikum og hugflogsríkum spæli hjá Stjørnuni.

## Gott kontraspæl

Styrkin hjá Stjørnuni hesaferð var skjóta kontraspælið, sum skapti nógvar møguleikar - nógv fleiri enn tað sást aftur í talinum av málum. Og so var Simona Dziugyte ein støðug hóttan við síni stóru skotstyrki og ágangandi spæli.

Dugnaligi strikuspælarin hjá Stjørnuni, Una Olsen, var lítið við í hesum dystinum. Tað eydnaðist ongantíð at spæla hann leysa, soleiðis sum tað var gjørt nógv av í dystinum ímóti Neistanum seinast. Í seinna hálvleiki sat hon meginpartin av tíðini á beinkinum.

Málverjin hjá Sóljuni, Kristina Griksaite, hevði onkrar góðar bjargingar, og hon forðaði stundum fyri, at Stjørnuspælarar í góðum støðum fingu málini, sum tær ætlaðu sær.

Samanumtikið ein sannførandi sigur til Stjørnuna, sum í næsta dysti sínum rættiliga sleppur at royna seg. Tá er tað sterka føroyameistaraliðið úr Vestmanna, sum er mótstandari, og tá krevst nógv meira fyri at vinna, enn tað gjørdist hendan Sóljusunnudagin.

**Dysturin í tølum:**
**Stjørnan-Sóljan 34-22 (19-8)**
Málskjúttar:
Stjørnan: Simona Dziugyte 13 (1), Anna Kristina Samson 7, Andrijana Milodanovic 7 (1), Joan Midjord Joensen 4, Beinta Klakkstein 2, Birgit Ryan 1.
Sóljan: Asta Petrauskiene 8, Herta Simonsen 7, Sólja Jóanisdóttir 3, Heidi Haraldsen 2, Johanna í Horni 1, Heidi Maria Akselsen 1.
Brotskøst: Stjørnan 4, Sóljan 5
Útvísingar: Stjørnan 5, Sóljan 2
Dómarar úr StÍF: Poli Hansen og Jústines Justinussen. Leiddu dystin uttan hóvasták.

StÍF-VB 20-31 (10-13):

# VB rann frá StÍF

**Alt rapaði hjá StÍF í seinna hálvleiki, tá vágskvinnur rættiliga settu ferð á og skutu mál í hópatali**

HONDBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*

Tað var seinasta partin av dystinum, at vágskvinnur fullkomiliga runnu StÍF um koll. Uppflytararnir av Strondum og Skála høvdu ikki orku til at fylgja við sterka VB-liðnum seinna hálva tíman.

Í fyrra hálvleiki var lítil munur millum liðini. VB var fyri tað mesta á odda, men StÍF hekk alla tíðina í teimum. Onkra løtu var VB framman fyri við tveimum málum, men so togaði StÍF seg innaftur.

Tað var ikki fyrr enn seinasta minuttin í fyrra hálvleiki, at VB økti leiðsluna hjá sær upp í trý mál. Í fyrra hálvleiki - sum í seinna - var tað serliga Gabriella Fekete, sum skaraði fram úr hjá VB. Hon skoraði 16 ferðir í hesum dystinum, og tað tóktist, sum tað var fullkomiliga vónleyst at steðga henni. Hon loyvdi sær enntá at brenna tvey brotskøst.

Gabriella gjørdi nógv góð mál, og hon var ein støðug hóttan gjøgnum dystin. Hon kann fara at gerast ein veruligur jokari hjá VB, sum við øðrum evnaríkum spælarum á liðnum, ætlar at bjóða VÍF og hinum av í gullstríðnum.

## Stórur munur

Munurin millum VB og StÍF øktist so líðandi í seinna hálvleiki. Heimaliðið hevði tað truplari, meðan útiliðið var alt meira ágangandi, so hvørt sum orkan fór at ganga undan hjá vertunum.

Miðskeiðis í seinna hálvleiki rapaði alt hjá StÍF. VB skoraði sjey mál eftir fáum minuttum, meðan eitt lamsligið heimaliðið einki mál fekk hesa løtuna. Tað skapti grundarlagið fyri stóra sigrinum, og hóast StÍF í hesi svørtu løtu royndi at taka time-out fyri at savna tropparnar aftur, so eydnaðist tað ikki.

Seinastu 18 minuttirnar av dystinum gjørdi StÍF fýra mál, meðan VB skoraði 13 ferðir. Tað var serliga Gabriella Fekete, sum gjørdi um seg, men pláss var eisini hjá Reginu Rado og Gurið Mortensen at gera fýra mál í part.

Eftir fyrstu fýra dystirnar hava uppflytararnir í StÍF framvegis fyrsta stigið til góðar, meðan VB hevur vunnið tveir av sínum fyrstu trimum dystum.

**Dysturin í tølum:**
**StÍF-VB 20-31 (10-13)**
Málskjúttar:
StÍF: Ileana Manulescu 7, Sunfríð B. Jacobsen 7, Anna Berg Danielsen 3, Poula Olsen 2, Birna Mikkelsen 1
VB: Gabriella Fekete 16, Regina Rado 4, Gurið Mortensen 4, Durita Rouch 2, Sólrun Krosslá 2, Jensia Petersen 2, Margret Augustinussen 1
Brotskøst: StÍF 7, VB 4
Útvísingar: StÍF 0, VB 2
Dómarar úr NSÍ: Trygvi Mortensen og Kári Hansen